## Blaka tosk í havið

Ein svenskur skipari hevði herfyri grein í Gøteborg-Posten, har hann segði seg vera noyddan at blaka stórar nøgdir av fiski í havið aftur. Orsøkin er, at hjáveiðikvotan er so lítil. Talan er um fisk fyri eina miljón krónur gjøgnum eitt ár – bara hjá hesum eina skipinum. Í besta føri hevur skipið hjá honum eina toskakvotu upp á 600 pund um vikuna, og hesa nøgd fiskar hann longu tað fyrsta samdøgnið, hann er til fiskiskap. Restin av toskinum, sum hann fær í eina viku, verður blakaður í havið aftur, tí hann hevur ikki loyvi at føra fiskin til lands. Sama er við upsa, hýsu, longu, hvítingi og reyðsprøku, sum eisini verða tveitt í havið aftur.



# FISKAR fyridømi um gott samstarv

**- Tá ið eg helt, at eg var komin undir land við bókini, var eg ikki komin meira enn í helvt, segði Rógvi Mouritsen, rithøvundur, við móttøkuna í Nóatúni seinnapartin í gjár**






*- Heiðurspersónurin í dag er Rógvi. Bókin hjá tær er eitt megnarverk, sum tú eigur alla æru fyri, segði Helena Dam á Neystabø*

BÓKAÚTGÁVA
*Vilmund Jacobsen*
*Myndir: Mourits M. Joensen*

Nógv fólk var til móttøku í Nóatúni í gjár, tá ið Rógvi Mouritsen legði fram snotuligu bók sína um Fiskar undir Føroyum.

Hjalti í Jákupsstovu, leiðari á Fiskirannsóknarstovuni segði, at bókin er ein fongur fyri stovnin, og hon er eisini ein fongur fyri Føroyar.

Leiðarin greiddi frá, at Rógvi, sum byrjaði at arbeiða á Fiskirannsóknarstovuni í 1971, hevur nógvar praktiskar royndir, og at hann skjótt vísti stóran áhuga fyri fiskinum í havinum. Hann byrjaði at skriva niður, og í dag fyriliggur úrslitið í hesi bók.

– Praktiskar royndir eru góðar, tá ið aðrir gerast ov háfloygdir. Tá er gott, at onkur er, sum kann hála hinar niðuraftur á jørðina.

Hjalti í Jákupsstovu vísti á, at nógvir partar hava hjálpt til og hava stuðlað undir at fáa bókina út, men tað, sum fer at standa eftir, er, at hetta er bókin hjá Rógva Mouritsen.

### Nøgdur rithøvundur

Áðrenn vit fara at endurgeva ein part av tí, sum Helena Dam á Neystabø, leiðari á Føroya Skúlabókagrunni, segði, fari vit at nerta við fáu, men áhugaverdu orðini, ið Rógvi sjálvur bara fram við høvið.

Rógvi segði seg vera ovfarnan av, at so nógv fólk vóru møtt til móttøkuna.

– Eg havi einki manuskript við í dag, tí pappír havi eg sæð nóg mikið til í seinastuni.

Mamma rithøvundan, Gigga, sum er farin um tey níti, var eisini við til framløguna, og meðan hon og onnur løgdu oyru til, ásannaði Rógvi, at hann er glaður fyri bókina, nú hon er liðug og er komin út.

Við móttøkuna nýtti rithøvundurin eisini høvi til at takka øllum, sum høvdu stuðlað undir og hjálpt honum við útgávuni.

– Tá ið eg helt, at eg var komin undir land við bókini, var eg ikki komin meira enn í helvt, segði Rógvi Mouritsen.

### Helena takkaði

Leiðarin á Føroya Skúlabókagrunni, Helena Dam á Neystabø, segði eisini nøkur orð vegna grunnin, ið stendur fyri útgávuni.

– Eg vil vegna Niels Petersen, ritstjóra á Føroya Skúlabókagrunni, nýta høvi at takka teimum mongu, ið hava verið við til at gera útgáva møguliga.

Hon segði, at Hjalti í Jákupsstovu hevur loyst fleiri knútar við eitt nú at fáa til vega loyvi at nýta myndir.

– Jákup Reinert hevur viðgjørt alt handritið yrkisliga, og hann hevur eisini verið góður í ráðum málsliga. Magnus Gaard hevur viðgjørt partar av bókini og hevur eisini ráðgivið málsliga, og Eyðfinn Magnussen hevur ráðgivið um fiskaskipanina.

Helena takkaði eisini Svenningi Tausen fyri at